**Daniel J. Danielsen:**

# Føroya fyrsti heidningatrúboðari

**Sum vit greiddu frá hósdagin í røðini "Hendur ið Sleptu" fara vit nú undir eina røð um Daniel Jacob Danielsen, sum er kendur sum trúboðari í Føroyum fyrst í hini øldini. Eisini er tað kent, at hann virkaði í Congo árini 1901-1903. Tað er ikki nógv, sum fólk vita um hetta hansara virksemi. Tað er eisini sera avmarkað, hvat ið er skrivað um hansara avrik í Congo og serliga um hansara virksemi at útvega fólkinum har sømilig kor.**
**Men vit hava savnað upplýsingar um hansara virksemi bæði í Føroyum og uttanlands og kunnu tí geva lesarum okkara eina forvitnisliga og eisini spennandi frásøgn um Dollan, sum hann eisini varð kallaður. Í hesum partinum verður fyrst og fremst greitt frá hansara virksemi grundað á føroysku keldurnar. Í komandi pørtum verður greitt frá virkseminum í Congo, grundað á útlendskar keldur**


Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**1. partur**

### Mamman kendi H. C. Andersen

Ludvig Daniel Jacob Danielsen var sonur Siggu, ella sum hennara fulla navn var Sigrid Frederikke Angelica Danielsen, (1. 1. 1841-18.01.1922).


Daniel J. Danielsen sum ungur

Foreldrini hjá henni vóru Daniel Danielsen, timburmaður í Havn, og Lise Margrethe Reinert, ættað av Nesi.

Tað er ógvuliga lítið, fólk vita um Siggu sum unga. Men sagt verður í ættini, at hon sum ung genta plagdi at trilla Niels Finsen í barnavogni.

Sigga fer til Danmarkar í 1865, har hon var í húsi hjá eini ríkari familju, har ævintýrskrivarin H. C. Andersen plagdi at koma.

Sigga kemur fyri barn við einum "smedesvend", sum æt Ludvig Jørgensen, og hon fær ein son tann 25. juni 1871. Bústaðurin hjá henni var Nørrevold 40, sum er mitt í Keypmannahavn. Hetta er gøtan sum í dag kallast Nørre Voldgade, har S-støðin Nørreport liggur. Nummar 40 er ikki til í dag. Hetta húsanummar er horvið millum nr. 38 og 42.

### Upkallaður eftir ókenda pápanum

Drongurin verður doyptur í Vor Frue Kirke, dómkirkjuni í Keypmannahavn, sum liggur í Nørregade, sum gongur oman frá Nørrevold. Hann verður doyptur tann 25. oktober sama ár, og hann fær navnið Ludvig Daniel Jacob Danielsen. Sum tað sæst er Daniel eisini uppkallaður eftir pápa sínum, sum ikki hevur verið heilt gloymdur. Ludvig navnið hevur hann kortini ikki brúkt.

Sigga kemur nokk so skjótt aftur til Føroyar, tí tann 26. apríl 1874 giftist hon við Jákup á Kamarinum, sum var timburmaður og gravari. Sigga var onnur kona hansara.

Sigga og Jákup fingu fimm børn saman, men bert eitt kemur undan, og tað var Magnus, sum var ein kendur arkitektur og byggimeistari. Hjá teimum á Kamarinum verður Daniel framvegis kallaður "onkil Dánjal", og tey hava eisini givið síni íkøst til hesa søgu. Í morgin verður teirra grøv umrødd í røðini "Hendur ið sleptu".

### Fer av landinum

Sigga var systir postmeistaran og sparikassastjóran Christian Cornelius, vanliga skrivaður C.C. Danielsen í Havn, og Dollin, sum hann var kallaður í uppvøkstrinum, kom at vaksa upp hjá honum og konuni Onnu Sofíu. Daniel varð konfirmeraður í Havnar kirkju 2.mai 1886.

Ein beiggi C.C. Danielsen var sýslumaðurin D. J. Danielsen í Søldafirði, sum var pápi Victor, kendur sum trúboðari og Gunnar, kendur sum skipari. Onnur systkin teirra vóru Elsa, Lisa, Betty og Petur. Postmeistarin var ógvuliga gudrøkin og royndi at geva Daniel góða og kristiliga uppvenjing, men hann var rættiliga buldrasligur ella, sum hann sigur sjálvur, eini rættiligur íspegil.

Á ungum aldri, um 18 ára gamal, fór Daniel til Skotland og lærdi til maskinmeistara. Nøkur ár sigldi hann við enskum damparum, sum fluttu emigrantar til Amerika. Hesa tíðina hevði hann tveitt alt, sum kallaðist religión, frá sær.


Daniel J. og Lina Danielsen

Men á einum útimøti í Glasgow, tá ið hann varð 27 ár, varð hann umvendur. Og tað var ein umvending við lít. Hann slepti øllum verðsligum. Tað mest verðsliga hann kundi gera seinni í lívinum var sambært A.W. Sloan, at hann kundi freistast til at lesa meinaleysar tekniseriur, um hann rann seg fram tær!

### Congo var snarvegur til himmals

Hann kom eina tíð at virka í eini sjómansmissión í Glasgow. Eftir at hava virkað her eina tíð, var hann eitt ár á missiónsskúlan Harley College í London at fyrireika seg at gerast trúboðari. Hann kom at virka fyri Congo Balolo Mission, CBM, sum upprunaliga var grundað av David Livingstone.

Danski rithøvundurin Peter Tygesen sigur um Harley College, at tað "var en ganske særlig missionsinstitution, vokset frem af datidens karismatiske bevægelse og oftest blandt samfundets laveste. Mange af deres prædikanter optrådte på pladser og gader eller i primitive forsamlingshuse.

Sømandsmissionen var et af deres særlige bevågne områder, ofte foregik dette arbejde direkte